# Motorsúkklukoyrarar úr Hetlandi




*F.v.: Ove Ritter, frá HD.fo, Carol og Colin Fraser, Brian Anderson úr Hetlandi, og Ron McMillan, úr Glasgow*
*Mynd Jens Kristian Vang*

**Mánadagin komu fýra fólk úr Hetlandi við Norrønu á hvør síni motorsúkklu. Tey koyra kring landið og vitja ymisk støð í Streymoy, Eysturoy og í Vágum. Eitt av endamálunum er at skriva ein ferðafrásøgn fyri eitt skotskt MC-magasin**

MC-VITJAN
*Magnus Gunnarsson*

Við Norrønu mánadagin vóru fýra motorsúkklukoyrarar, sum komu higar úr Hetlandi at vitja. Ein teirra var Ron McMillan freelance journalistur úr Glascow í Skotlandi, ið skrivar eina ferðafrásøgn til skotska MC-magasinið ”Motorcycle Sport & Leisure”.

Ron McMillan hevur altíð havt stóran áhuga fyri motorsúkklum og skrivar javnan ferðafrásøgnir. Hini í ferðalagnum eru hjúnini Colin og Carol Fraser og Brian Anderson úr Hetlandi.

Mánakvøldið vitjaðu tey í felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum, og týsdagin gekk leiðin til Saksunar og bygdirnar í Norðureysturoy. Um kvøldið vitjaðu tey nýstovnaða felagið MC Eysturoy. Tey vitja eisini í Mjørkadali, á Sornfelli og í Vágum.

Tað er Ove Ritter frá Harley Davidson í Føroyum, sum saman við sponsorum skipar fyri vitjanini. Ferðalagið fer avstað aftur við Norrønu fríggjadagin.


## Starv í KT-deildini á Føroya Tele

*"Kreativitetur krevur dirvi at sleppa øllum sannleikum"*
- Erich Fromm



KT-deildin, sum er skipað sum partur av móðurfelagnum Føroya Tele, veitir KT-tænastur til feløgini í konsernini. Deildin heldur til í nýggja høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Umframt rakstur og viðlíkahald av KT-umhvørvinum, hevur deildin ábyrgdina av menningini av skipanum til m.a. kundarøkt og avrokning.

Áhaldandi menningin á bæði tøkniliga og handilsliga økinum setir stór krøv til felagið – og ikki minst til KT-deildina.
KT-strategi og hartil knýtt virkismenning, verkætlanarleiðsla og tøknilig KT-menning eru týdningarmikil fyri at røkka strategisku málunum hjá konsernini.
Umsøkjari má hava royndir innan eitt ella fleiri av hesum økjum.

Umsøkjari skal hava útbúgving frá hægri lærustovni, so sum verkfrøði, dátufrøði, cand.merc. ella líknandi, og verða sinnað/-ur at arbeiða í verkætlanum sum kunnu nema við øll øki í konsernini.

Løn og setanarviðurskifti verða eftir galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir avtalu.

Nærri fæst at vita frá Michael Thomsen, mth@ft.fo, tel 243071 ella Starvsfólkadeildini á tel 303030.

Umsóknir við avritum av prógvum og ummælum skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 24. apríl 2006 og skulu stílast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er størsti veitarin av samskiftistænastum í Føroyum. Felagið er skipað sum eitt móðurfelag og trý dótturfeløg. Samlaða starvsfólkatalið er 230, og í 2005 var samlaði umsetningurin kr. 307 mió.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*